## Atgongumerkir við dyrnar til Summar Festivalin

Higartil hevur bert verið gjorligt at keypa vikuskiftispass til Summar Festivalin, men tá ið Summarfestivalurin byrjar hósdagin, ber eisini til at keypa dagsbillettir við dyrnar.

**Dagsbillettir við dyrnar**
Atgongumerki hósdag: 400 kr.
Atgongumerki fríggjadag: 500 kr.
Atgongumerki leygardag: 600 kr.

**Vikuskiftispass við dyrnar**
Vikuskiftispass vaksin: 995 kr.
Born 6-12 ár: 200 kr.
Born 0-5 ár: Ókeypis



*Mótvegis siðvenjuni, so lat Kári P. eitt umboð fyri miðlaheimin sleppa inn um, tá hann mikukvøldið leitaði sangperlur sínar fram og vandi saman við tónleikarum*

# Kári P

**Mikukvøldið vandi vísusangarin og yrkjarin Kári P. Í serstøkum hølum hjá Edvardi Nyholm Debess hesumegin ringvegin mitt í Havn ljómaðu klassikararnir hjá fólkakæra sangaranum, meðan hugni, prát og skrøgg eisini fingu rúm, tí lagið, formurin og spenningurin undan stóru framførsluni á Summar Festivalinum leygardagin tykjast vera í lagi. Sosialurin slapp við til venjingina**

TÓNLEIKAVITJAN
*Orð og myndir: Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Kári P hevur tvær útgávur á baki. Ikki hava framførslurnar verið so ovurhonds nógvar, men hóast hetta, so er hann ein hin fólkakærasti vísusangarin, ið føroyingar hava, og dygdin í bæði løgum og teksti hava gjørt sítt til, at lítla rúgvan av gullkornum eru nærum øll sum ein vorðin fólkaogn.

Men hugurin hjá fynduga orða- og tónasmiðinum at koma í miðlarnar liggur á somu leið, sum útgávuvirksemið og framførlurnar; dygdini bilar onki, men hugurin at koma í ljósið er ikki rættiliga til staðar.

Kári P er egin í orðsins positiva týdningi. Ongin kann sum hann seta orð saman, skapa nýggj og seta løg til. Og hann telist millum tey pallfólk, ið sjáldan vitja pallin, og sum helst sær, at miðlafólk halda seg hinumegin ringvegin, fyri nú at nýta orðini, ið eru heitið á seinnu útgávu skaldsins.

Men mikukvøldið eydnaðist Sosialinum at sleppa við til venjing. Tað eydnaðist at sleppa at vera "fluga á vegginum", meðan Kári P vandi saman við Edvardi Nyholm Debess og Finni Hansen.

Venjingin fór fram hjá Edvardi, ið hevur gjørt sær góðar umstøður í húsunum við Tvørgøtu í Havn, har hann hevur samanbygt lítið úthús, og stovu við stórum rútum, við sethúsini. Alt gjørt so, at tónleikaumstøður eru frammaliga í huganum.

Hetta er sum ein annar heimur mitt í Havnini, har tónleikurin fær egið lív, uttan mun til, hvat hendir uttanfyri vindeyguni og girðingina við alfaraveg í Havn.

### Shjjjj, Edvard Svevur!!

Klokkan er farin nakað av 20, tá eg banki á glashurðina í stovuni, tí eg eri gingin runt um húsini og inn í aldingarðin. Har inni sita teir og hugna sær, og prátið gongur um ymiskt søguligt og tónleikakent.

Á borðinum liggja eini 10-15 munnhørpur, allar í ymsum duri, og kaffi verður skonkt í myrkagulu kopparnar.

Og sum ein hugmynd, ið blaðmaðurin fær fyri onki, so verður prátað og roynt við einum framkomnum "stemmi-aparati", ið er við til at stemma guitarin, men eisini við til at byrja kvøldið og skapa rætta stemmningin, rætta huglagið.

Prátað verður um innspælingarnar av teimum baðum útgávunum hjá Kára, Væl-



